# Hví harmast Per Stig Møller, tá ið Edmund Joensen fegnast?

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Per Stig Møller, uttanríkismálaráðharri dana, sum skal verja donsk áhugamál, harmast, meðan Edmund Joensen, sum átti at vart føroysk áhugamál, fegnast! Hetta er ein av niðurstøðunum av IWC málinum, sum var frammi í farnu viku.

Per Stig harmast, tí hann noyðist at fylgja einum kravi frá meirilutanum í Fólkatinginum. Kravið er, at hann skal atkvøða fyri einum uppskoti í IWC um at friða hval í Suður Atlantshavi. Eitt krav sum stríðir ímóti føroyskum áhugamálum.

Edmund Joensen fegnast tí ríkisfelagsskapurin er trygdin fyri føroyskum áhugamálum.

Hann skrivar m.a.í aðrari av greinum sínum í farnu viku:"Undirritaði hevur í dag havt samband við ymsar partar í politiska umhvørvinum á Christiansborg, og tann greiða ábendingin er, at stjórnin fer at halda somu kós í IWC sum higartil. Tað merkir, at føroyska og grønlendska sjónarmiðið um, at hvalaveiða kann loyvast, tá hon fer fram á burðardyggum grundarlagi, framvegis er almenna sjónarmiðið hjá Ríkisfelagsskapinum í IWC" Men greinin er ikki meira enn komin í blaðið, so hoyra vit í Útvarpi Føroya, at Per Stig Møller harmast støðuna, hann er komin í, og at hann noyðist at fylgja kravinum frá meirilutanum í danska Fólkatinginum (og ikki bara frá SF, sum EJ annars rør upp undir í greinini). Harvið gongur hann, Per Stig Møller, og danska stjórnin ímóti ynski føroyinga og grønlendinga, og setir soleiðis áhugamál okkara til viks í hesum málið. Tað merkir, at føroyska og grønlendska sjónarmiðið um, at hvalaveiða kann loyvast, tá hon fer fram á burðardyggum grundarlagi, sum var almenna sjónarmiðið hjá Ríkisfelagsskapinum nú er slept

**Prinsipielt mál**

Her er tað, at málið gert rættiliga prinsipielt. Í altjóða høpi og í altjóða felagsskapum sum t.d í IWC er tað egoistiskt bara at arbeiða fyri sær og sínum, og naivt at halda seg kunna fáa nakað burturúr, við bara at arbeiða fyri bara sær og sínum. Tað er lætt at fara skeiv, um hildið verður, at onnur verja okkara øki, tá ið vit leggja vertin á teirra, hóast áhugamálini eru tey somu.

Og tað er tað, sum er við at henda her. Vit – okkara umboð – fer at atkvøða fyri at friða hval á einum fjarskotnum øki. Tá okkara almenna sjónarmið úti í heimi tekur undir við at friða hvalin aðrastaðni. Hvønn stuðul kunnu vit so vænta av hinum limunum í IWC, tá ið talan er um at veiða hval á okkara leiðum.

**Hví harmast Per tá ið Edmund fegnast**

Hóast Per Stig Møller kennir seg noyddan at fylgja kravinum frá Fólkatinginum, og hóast hann sigur seg harmast, nú hann sum umboð okkara í IWC, ikki er førur fyri at verja okkara sjónarmið, so fegnast harafturímóti Edmund Joensen. Hann kemur til ta niðurstøðu í seinnu grein síni í vikuni, sum fór, at málið vísir "at Ríkisfelagsskapurin fylgir við tíðini og framhaldandi er fult førur fyri at verja áhugamálini hjá Føroyum og Grønlandi."

Í staðin fyri at sannføra sínar starvsfelagar á Christiansborg um, hvussu skeivt tey arbeiða í hesum máli, so skrivar hann teigar upp og niður um, hvussu fantastiskur Ríkisfelagsskapurin er. Og skal hetta málið verða dømi um tað!

Sjálvandi eiga føroysk fólkatingsumboð at arbeiða fyri føroyskum áhugamálum á Christiansborg. Eisini sambandsumboð! Í hesum føri átti orka tí at verið løgd í, at sannført tey donsku fólkatingsumboðini um, hvussu skeivt tað er av teimum at stríðast ímóti føroyskum áhugamálum. Og soleiðis víst á, hvussu illa grundað uppskotið um friðing er, sum tey krevja, at Per Stig Møller skal atkvøða fyri. Men tað ger Edmund Joensen ikki. Hann fegnast harafturímóti, og vísir á, hvussu væl føroysk sjónarmið eru vard í Ríkisfelagsskapinum.

Hvussu kunnu donsk fólkatingsumboð halda seg gera nakað galið móti føroyingum, tá ið annað av føroysku fólkatingsumboðunum í tvinnanda greinum fegnast um støðuna, tey hava sett føroyingar í?

# Føroyskur uttanlandspolitikkur er eitt alment dulsmál

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Hóast Løgtingið hevur samtykt at lata nýggja uttanríkisráðnum hjá heimastýrinum 30,7 mió. kr. til virksemi sítt í ár, veit ongin í Tinginum, hvønn uttanlandspolitikk**

**Føroyar reka**

CHE-landsstýrið hevur havt egið sonevnt uttanríkisráð við egnum landsstýrismanni í uttanlandsmálum, síðan sitandi landsstýrið tók við.

Nógv almenn ferðing og vitjanir hava verið á skránni, og sunnukvøldið kl. 18.00 boðaði landsstýrismaðurin í Útvarpinum frá, at nú skal ein bygningur keypast til føroyska sendistovu í New York. Seinni kemur ein sendistova í Moskva.

Kortini veit enn ongin, hvør almenni føroyski uttanlandspolitikkurin er.

Tað tykist, sum landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum fokuserar upp á form heldur enn innihald.

Tað álvarsliga er, at Løgtingið heldur onga hóming hevur av, hvør almenni uttanlandspolitikkurin í landinum er. Tingið, sum herfyri samtykti at lata uttanríkisráðnum uml. 30,7 mió. kr. á fíggjarlógini, er heldur ikki kunnað um, hvørji úrslit eru komin burtur úr nógva almenna ferðavirkseminum hjá landsstýrismanninum, og hvat sendistovan í USA ítøkiliga skal brúkast til.

30,7 mió. kr. er nógvur peningur. Upphæddin svarar til tað, Landssjúkrahúsið manglar til tess at fáa endarnar at røkka saman.

Formliga eigur landsstýrismaðurin at kunna uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, men hon hevur ikki fingið upplýsingar um omanfyri nevnda.

Miðflokkurin í CHE-landsstýrinum eigur formannin í uttanlandsnevndini. Formaðurin, Jenis Av Rana, eigur sum skjótast at kalla uttanlandsnevndina saman, og nevndin má krevja av landsstýrismanninum, at hann kunnar nevndina um ítøkilig úrslit av virkseminum higartil.

Løgtingið má fáa greiðu á, hvat tað hevur játtað pening til, og hvør uttanlandspolitikkurin er.

# FSF er størsta rukkan í Føroyskum fótbólti!

JOHN JOHANSEN

Herfyri tók aganevndin avgerð í málinum um 2. deildar dystin millum 07 Vestur og MB. 07 Vestur nýtti ein leikara, sum hevði fingið reytt kort í seinasta dysti undan hesum!

Aganevndin var av tí áskoðan (sjálvandi), at leikarin var ólógligur, og 07 Vestur skuldi tapa dystin, júst soleiðis sum nærum allar heimsreglur eru skrúvaðar saman, tá tað snýr seg um ítrott.

Men nú hevur gud hjálpi mær eitt teir rópa fyri yvirkærunevndin strika allan sið og allar reglur og annars tulkað sínar egnu reglur soleiðis, at leikarin mitt í øllum var lógligur!!! Teir siga, at leikarin sat yvir í 1. deildar dystinum, sum var leiktur tríggjar dagar áðrenn!!!!! Leikarin er ikki í nær námind av 1. deildar hópinum hjá 07 Vestur, og eg meini eisini, at hann ONGANTÍÐ hevur spælt við 1. deildar liðnum hjá 07 Vestur. Allíkavæl metir yvirkærunevndin, at hann kann avsona karantenuna, tá 1. deild spælir! Annars siga reglurnar, at leikari skal sita karantenur av sær í tí deild, hann hevur fingið karantenuna!!! Hvat er hetta fyri fananskapur, sum gongur fyri seg í FSF?

Tað gongur heilt greitt fram, at onkur hevur okkurt ímóti 4. elsta felagnum í Føroyum.

Fleiri feløg hava vent sær til venjarar og nevndina í MB og nærum fordømt avgerðina hjá FSF og siga seg ikki skila eitt einasta petti av tí heila. Takk fyri tað.

Hendan avgerðin kann fáa katastrofalar avleiðingar í fleiri ár fram.

MB hevur lið í 3. deild. Hereftir fer 3. deildar liðið hjá MB at spæla áðrenn 2. deild hvørjaferð. So kunnu leikarar, ið hava karantenu bara sita yvir í tí dystinum!!!

Tað vil so aftur siga, at tað fer ONGANTÍÐ nakar at hava karantenu aftur!!! Og ja, um hini liðini eru líka klók sum vit og fylgja ráðunum, ella reglunum um tú vilt, hjá FSF, so fer ONGIN LEIKARI Í FØROYUM AT HAVA KARANTENU AFTUR Í NAKRARI DEILD!!!

So míni ráð til FSF er at lesa regluna "rætt" og taka til eftirtektar tað, sum aganevndin kom til.

Víðari gott kappingarár

